# Hugnaløta fyri Jens Paula

*Myndir: Pætur Niclasen*

Rithøvundurin og skaldið Jens Pauli Heinesen, ið er ein av okkara kendastu rithøvundum, fylti 75 ár mánadagin 12. november.

Í tí sambandi var móttøka í heiminum í Stoffalág í Havn hendan dagin, har nógv fólk nýttu høvi at støkka inn á gólvið. Familja, vinir og kenningar vóru saman til eina hugnaløtu við røðum og sangi saman við føðingardagsbarninum.

Teir sum hildu røðu vóru: Jóhan Hendrik Winther Poulsen, professari, Høgni Hoydal, løgtingsmaður, og Hanus Kamban, rithøvundur. Hanus Kamban segði m.a. í røðu síni at Jens Pauli sum persónur ofta var við tí góða orðinum og at hann á tveimum økjum, í almennum orðaskifti, hevði víst eitt serligt dirvi. Í fyrsta lagi tí hann var ein av teimum heilt fáu, sum longu tíðliga í tíðini hevði at grindadrápi, sum tað fór fram tá t.d. í Havn, her var Jens Pauli undan síni tíð.

Og í øðrum lagi, at hann, hóast hann als ikki var USA-vinarligur, longu um 1960, kanska enntá fyrr, hevði hann at tí víðgondu kommunistisku hugmyndafrøðini og m.a. fanst at

Castro og teimum mongu deyðadómum, sum vórðu framdir á Cuba, stutt eftir at Castro hevði fingið valdið. Eisini her vísti Jens Pauli dirvi.

Hanus nevndi eisini sum dømi skaldisøguna „Ein einsligur floytitóni" hjá Jens Paula, sum Maud, kona hansara las upp í Útvarpi Føroya eina ferð í 70-árunum. Søgan var meistaralig og upplesturin framúr.

Eisini sang Elin, dóttir Jens Paula, kenda sangin „Eitt dýpi av dýrari tíð" við gittara-undirspæli.

mg



*Jens Pauli Heinesen saman við børnunum: Janus, Elin og Marianna*



*Barndómsvinurin Palle Gregoriussen og Jens Pauli*



*Elin Heinesen syngur sangin »Eitt dýpi av dýrari tíð« fyri pápanum*



*Jens Pauli saman við systrunum f.v.: Hildigunn, Ásvør og Hjørdis. Brøðurnir Jóannes og Klæmint vóru burturstaddir føðingardagin*



*Svenning av Lofti og Jens Pauli skemta sær*



*Ólavur Clementsen við onkrari gávu*



*Hanus Kamban, rithøvundur, og Høgni Hoydal, løgtingsmaður, saman við Jens Paula*